FISKIMÁLARÁÐIÐ

# Løgfrøðingur og fulltrúi til Fiskimálaráðið

Søkt verður eftir einum løgfrøðingi og einum fulltrúa til Fiskimálaráðið.

**Løgfrøðingur**
*Høvuðsuppgávur*

- at menna og dagføra tær lógir og kunngerðir, ið stjórnarráðið umsitur, serliga lógarøkið innan fiskivinnu
- at standa fyri løgfrøðiligari ráðgeving í síni heild
- at standa fyri kæruviðgerð, málsviðgerð og hjálpa til í rættarmálum
- at tryggja og menna fyrisitingarligar mannagongdir
- at luttaka í ymsum arbeiðsbólkum innanhýsis í stjórnarráðnum, eins og í innlendis og altjóða samstarvi

*Almenn førleikakrøv*

- Kandidatprógv í løgfrøði frá lærdum háskúla (cand.jur.).

**Fulltrúi**
*Høvuðsuppgávur*

- at hava um hendi málsviðgerð av umsóknum til Fiskivinnuroyndir,
- at umsita mál um royndarfiskiskap, fiskiveiðiroyndir og -verkætlanir annars, harundir spurningar um gagnnýtslu av fiskatilfeinginum
- viðgera mál, ið hava við gransking at gera og luttaka í ymsum samstarvi um gransking
- at taka stig til tiltøk, sum birta uppundir granskingar og menningarvirksemi og miðling av úrslitum innan fiskivinnugransking
- at umboða Føroyar í tí norðurlendska fiskivinnusamstarvinum.

*Almenn førleikakrøv*

- Viðkomandi akademiska útbúgving.

**Aðrir førleikar**
Fyri bæði størvini er tað eisini av týdningi, at tann setti

- kann arbeiða sjálvstøðugt og miðvíst

- hevur áhuga fyri samfelagsviðurskiftum og evni at síggja virkisøkið í síni heild, men eisini megnar at fara í smálutir, tá ávísar arbeiðsuppgávur krevja tað
- hevur góð evni at samskifta í talu og skrift á føroyskum, norðurlendskum og enskum fyri leikum og lærdum.

Løgfrøðingurin skal hava gott innlit í fyrisitingarrætt og lóggávusmíð, og fulltrúin hava fyrisitingarligar royndir, harundir innlit í fíggjarstýring.

**Setanartreytir**
Størvini eru fulltíðarstørv og verða flokkað eftir sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag. Størvini verða lønt eftir, hvørjar royndir og útbúgving tann setti hevur.

Tann, sum settur verður, skal tola møguligar broytingar í starvsinnhaldi og -formi.

Setanarøkið fevnir um Fiskimálaráðið og stovnar undir tí, umframt hini stjórnarráðini.

**Umsóknir**
Umsókn við upplýsingum um prógv, royndir og møguligum viðmæli verður sent til Fiskimálaráðið, postrúm 347, FO-110 Tórshavn, ella við telduposti til fisk@fisk.fo í seinasta lagi 11. januar 2021.

Nærri upplýsingar um starvið kunna fáast frá Andras Kristiansen, deildarstjóra, á telefon 553 241, ella senda teldupost til fisk@fisk.fo

*Fiskimálaráðið er eitt av sjey stjórnarráðum í landsfyrisitingini, ið veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í Fiskimálaráðnum starvast 16 starvsfólk. Umsitingarøkið fevnir um fiskivinnumál, fiskiveiðieftirlit, fiskirannsóknir og –gransking, inntøkutrygd fiskimanna, hvalamál, bjarging, tilbúgving, trygd og veðurtænastu.*